# Kvinnurnar elska jólini

Jólaljós, jólagløgg, jólatræ og jólaperur. Tað er sanniliga nakað, sum kvinnum dámar væl. Tað vísir í øllum førum ein kanning, sum danska blaðið Urban hevur latið gjørt.

Kanningin vísir, at tað eru bert 9 prosent av kvinnunum, sum ikki gleða seg til jólini. Hinvegin er talið nakað hægri fyri menninar, tí har eru 16 prosent av monnunum ikki so spentir til jóla.

Hóast kvinnurnar ofta fáa uppgávuna at keypa flestu – ella allar – jólagávurnar til familjuna, so er tað eingin forðing fyri, at jólini eru ein góð árstíð hjá teimum. Kanningin hjá Urban vísir, at 74 prosent av kvinnunum í Danmark dáma sera væl at keypa jólagávur til familjuna. Bara 35 prosent av monnum siga tað sama. So kanska er tað ikki so løgið, at tað ofta eru kvinnurnar, sum taka tað stóra takið við jólagávunum.

Ein orsøk til hetta kann verða, at kvinnurnar vilja hava tamarhald á jólunum. Ein triðingur av kvinnunum í kanningini svarar, at tær gera av, hvussu jólini heima hjá teimum verða hildin. Bara fimti hvør maður sigur tað sama.



























